## TILTØK

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21.00: Útifundur.
Caféin er opin. Noomi er í »sminkubarrini«.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 v/ Malan Hentze. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti við Terja og Birgit Nielsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00: Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lymfødemfelagið**
Postrúm 2113,
FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 22. juli verður gongutúrur niðan á Svartbakstind. Havið góð og heit gonguklæði og matpakka við. Túrurin er tungur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Tilmelding.

**Tilhaldið**
í Tórsgøtu 21
*Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag*
kl. 14.00-18.00.
Á ólavsøku 27., 28. og 29. juli kl. 14.00-18.00 verður framsýning av listaverkum hjá Fridtjoffi Joesnen á 1. hædd og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá SIRRI. (Suðuroyar Ullvirki)
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða leygardagin kl. 17–18.00, sunnudagin kl. 11–12.00, mánakvøldið kl. 20–21.00 og týskvøldið kl. 20–21.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo

Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

**Javni**
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email:
punta@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419


NORDOYA SPARIKASSI

**Roknskapur 1. hálvár 2001**

***Rakstrarroknskapur 1. hálvár***

| | 2001 1.000 DKK | 2000 1.000 DKK |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 37.961 | 29.904 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 13.366 | 8.609 |
| **Netto rentuinntøkur** | **24.595** | **21.295** |
| Vinningsbýti av partabrævum o.ø. | 41 | 35 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.049 | 647 |
| Útreiðslur til kostnað og provisión | 38 | 34 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **25.647** | **21.943** |
| Virðisjavnan av lánsbrævum, gjaldoyra o.a. | 1.145 | - 2.448 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 266 | 443 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 11.730 | 12.544 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 500 | 400 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 269 | 137 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 3.316 | 2.950 |
| **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **11.243** | **3.907** |
| Skattur | 2.266 | 758 |
| **Hálvársúrslit** | **8.977** | **3.149** |

***Fíggjarstøða hin 30. juni***

| | 2001 1.000 DKK | 2000 1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 4.473 | 4.061 |
| Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 73.445 | 78.710 |
| Útlán | 634.393 | 618.271 |
| Lánsbrøv | 275.933 | 164.372 |
| Partabrøv o.a. | 921 | 642 |
| Ítøkiligar ognir | 11.130 | 11.297 |
| Aðrar ognir | 4.811 | 3.265 |
| **Ogn tilsamans** | **1.005.106** | **880.618** |
| **Skuld og eginpeningur** | | |
| Skuld til peningastovnar | 0 | 1.134 |
| Innlán | 799.778 | 698.153 |
| Onnur skuld | 10.602 | 8.784 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 2.790 | 2.331 |
| **Skuld tilsamans** | **813.170** | **710.402** |
| Eginpeningur | 182.959 | 167.067 |
| Hálvársúrslit eftir skatt | 8.977 | 3.149 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **191.936** | **170.216** |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.005.106** | **880.618** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuni** | | |
| Ábyrgdir | 10.532 | 13.202 |

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo




## TILTØK

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyahúsið í Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Føroyskt møti í Álborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris.
Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til
Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

### DIAMANTBRÚDLEYP

Hósdagin 26. juli hava hjúnini Tordis og Jóhannes Poulsen á Válinum diamantbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa upp á diamantbrúðarparið, eru vælkomin til ein kaffimunn eftir kl. 19.00.

### SILVURBRÚDLEYP

24. juli kunnu hjúnini Magna og Hans Martin Jacobsen, Fuglafjørður, halda silvurbrúdleyp. Opið hús verður í heiminum frá kl. 8–12.00, øll eru vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

24. juli hava hjúnini Kirstin og Sigbjørn Skúvadal í Vestmanna silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

Mánadagin 6. aug. hava vit silvurbrúdleyp, og vilja vit við hesum bjóða familju, vinum og kenningum at halda dagin saman við okkum í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18.30 hetta kvøldið. Vinarliga sigið frá á tel. 444440 ella 212440 áðrenn 1. aug.
***Odvør og Jógvan á Lakjuni, Fuglafirði***

### 40 ÁR

Maria Olsen í Árnafirði fyllir 40 ár 6. august. Dagurin verður hildin 10. august kl. 19.00 í Skálanum. Tey, sum ætla at gleða Mariu við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 456902 ella 456916 áðrenn 5. august.

### PRÓGV

Jens Rúni Poulsen, Tórshavn, hevur tann 1. juni í ár fingið prógv í HD-roknskapi, við Handilsháskúlan í Árhus.

### BRÚDLEYP

Í dag, 21. juli, kl. 17.15 giftast í Fuglafjarðar Kirkju Eileen Jørgensen úr Fuglafirði og Sjúrður Leivsson Eidesgaard úr Oyndarfirði. Brúðarveislan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík klokkan 18.30.

Í dag, 21. juli, kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Fríðbjørg Hammer, Tórshavn, og Michael F. Hansen, Udby. Veitsla verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.00.

Í dag, 21. juli, kl. 15.00 verða Rakul Dam og Rói Lindberg gift í Havnar kirkju. Brúdleypsadressan: Róðrarneystið á Argjum.

Í dag, 21. juli, kl. 14.00 giftast í Havnar kirkju Sunrid Petersen, Argir, og Leivur Ree Torvadal, Tórshavn. Veitsla verður kl. 19.00 fyri innbodnum Millum Gilja 89, Hoyvík.

Í dag, 21. juli, giftast í Bartolmeus kirkjuni í Crewkerne Maureen Katrin Djurhuus, Tórshavn, ættað úr Porkeri, og Christopher Clarke, Crewkerne. Brúdleypsadressan: The Hermitage, Hermitage Street, Crewkerne, Somerset TA18 8HA, England.

Í dag, 21. juli, kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Unn Lassen og Petur Martin Olsen, Klaksvík. Tá broyta tey eftirnavn til Glerfoss. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Skálanum.

Í dag, 21. juli, kl. 17.00 giftast í Hvalbiar kirkju Elisabeth Norðberg Eið, Hvalba, og Svein Eliasen, Tórshavn.

Í dag, 21. juli, kl. 12.00 giftast í Vesturkirkjuni Sára Skylv Reinert, Havn, og Arngrím Sigurd Thomassen, Sandavágur. Brúðarveitslan verður hildin í SÍF-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja heilsa uppá brúðarparið áðrenn farið verður vestur, eru vælkomin niðan á Grønlandsveg 43 millum kl. 13.00 og 15.00.

Í dag, 21. juli, kl. 14.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn Kariann á Lava úr Havn og Herleif Johannesen úr Skopun. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Í dag, 21. juli, kl. 8.00 giftast í Norðskála kirkju Hildibjørg Wang og Jógvan Sólsker, Oyrarbakka. Vælkomst verður til morgunkaffi í Eydnuni á Oyrarbakka frá kl. 9.00.

Leygardagin 28. juli giftast í Bethania kirkjuni í Aalborg, Kára Jensen av Argjum og Jes Veirum úr Aalborg. Adr. Thomasbossgade 18, 2 t.v., lejl. 48, DK-9000 Aalborg.

Fríggjadagin 3. august giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Vivi Heinesen og Árni Elttør, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður í Skálanum kl. 19.00 fyri innbodnum og vælkomst kl. 21.30.

Leygardagin 4. august kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Elna Poulsen og Martin Sømark, Hósvík. Brúðarveitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.30 fyri innbodnum.

Leygardagin 4. august kl. 16.30 giftast í Middelfart kirkju Sigrid Callagham, ættað úr Vestmanna, og Jan Dalberg, ættaður úr Tórshavn. Brúdleypsadressan er: Blekingevej 5, 5500 Middelfart.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Gunnvør Olsen, Syðrugøta og Gunnar Oluf Weihe, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 310306, 441459 ella 313897 áðrenn 21. juli. Til ber eisini at tekna seg á teldupost: geo@post.olivant.fo

Leygardagin 4. august giftast í Tvøroyrar kirkju Mariann Øster, Tvøroyri og Romicá Pascu, Craiova Rumenia, bæði búsitandi í Havn. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum á hesum stóra degi, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 371194 ella 371094. Til ber eisini at senda teldupost til moester@post.olivant.fo

Leygardagin 4. august kl. 16.00 giftast í Amfisalen í Moster Amfi, Linda Stangervåg, Rubbestadneset, og Søren Helligsøe Olsen, Hov. Brúdleypið verður í Rubbestadneset 5420, Bømlo, Norge.

Leygardagin 11. august kl. 16.00 giftast Una Hansen og Mourits S. Jacobsen í Klaksvík. Vælkomst verður í Tekniska skúla kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 456760 ella 455366 áðrenn 1. august.

Leygardagin 18. august kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Heidi Olsen, Eiði, og Jan Kjærbo, Klaksvík. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 456903 ella 423202.


HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




Leygardagin 21.07 kl. 20$^{30}$
Leygardagin 21.07 kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 22.07 kl. 20$^{00}$
Sunnudagin 22.07 kl. 22$^{30}$




Leygardagin 21.07 kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 22.07 kl. 23$^{00}$




Leygardagin 21.07 kl. 21$^{30}$
Sunnudagin 22.07 kl. 21$^{00}$




Leygardagin 21.07 kl. 19$^{00}$
Sunnudagin 22.07 kl. 18$^{30}$

www.in.fo/havnarbio